## Ímóti Afghanistan-krígnum

Meirilutin av amerikanska fólkinum eru ímóti krígnum í Afghanistan. Ein meiningakanning, sum CNN hevur latið gera, vísir, at 54 prosent av teimum spurdu eru ímóti amerikonsku krígsførsluni í Afghanistan. 41 prosent siga, at tey taka undir við amerikonsku luttøkuni har. CNN sigur, at alt fleiri amerikanarar venda sær ímóti krígnum í tí fjarskotna landinum. Í einari tilsvarandi kanning í mai vóru 48 prosent ímóti krígnum, meðan 50 prosent tóku undir við tí. USA misti 44 hermenn í Afghanistan í juli, og higartil hava 11 latið lív í hesum mánaðinum.



## Hart ímóti hørðum í Iran

Fleiri hundrað fólk gingu í gjár mótmælisgongu í iranska høvuðsstaðnum Teheran í sambandi við, at Mahmoud Ahmadinejad er settur í embærið sum landsins forseti. Samstundis koma tíðindi um, at myndugleikarnir fara sera harðliga fram ímóti andstøðufólki fyri at fáa andstøðuna at gevast við sínari misnøgd. Eitt nú skrivar ísraelska blaðið Jerusalem Post frá sínum keldum, at sjey løgfrøðingar eru myrdir, tí teir ætlaðu sær at verja andstøðufólk, sum sita í fongsli.

# Ritan aftur á gamlar slóðir

**Mikudagin sóu skopuningar aftur Rituna leggja at í bygdini**

NOSTALGI
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað var sum í gamlar dagar mikudagin, tá Ritan knappliga stevndi inn í havnarlagið í Skopun.

Orsøkin var, at Teistin fekk trupulleikar við elskipanini, og tað førdi við sær, at hann fekk ikki latið portrið upp, og tí fekst hvørki fólk ella bilar umborð.

Vit fóru beinanvegin at rigga Ternuna til, so hon kundi setast inn í siglingina, men tað fóru kortini at ganga nakrir tímar, áðrenn hon var klár. Hon liggur til dagligt í Suðri, men hon skal setast inn á ovastevnu kortini, so hon skuldi norður um fjør kortini, sigur Bogi Mortensen, stjóri á Strandferðsluni.

Men tað gjørdist long tíð




*Mikudagin lá Ritan aftur við kei í Skopun og lossaði*
*Mynd: Magnus Olsen*

hjá sandoyingum at bíða, og tí gjørdi Strandferðslan av, at seta Rituna inn á Skopunarleiðini.

Nólsoyingar høvdu longu havt tríggjar túrar um morgunin, meðan sandoyingar onga rutu høvdu havt í fleiri tímar, og tí gjørdu vit av at avlýsa túrin úr Havn klokkan 12 og úr Nólsoy klokkan 13, og í staðin seta Rituna inn í siglingina millum Skopun og Gomlurætt, sigur Bogi Mortensen.

Ritan fór tí av Havnini til Skopunar, og gjørdi so ein túr hagani á Gomluræætt og aftur til Skopunar. Síðani gjørdi Ritan enn ein túr á Gomluræætt, men tá høvdu menn fingið umvælt Teistan, og hann tók so yvir sína vanligu sigling.

Harvið var Ritan klár aftur á nólsoyarleiðini til túrin klokkan 16.20.

Sostatt var Ritan bert burtur tann eina túrin, meðan Ternan nú er klár at seta í sigling á ovastevnu.

# Kapprenning á ovastevnu

**Nú árið í ár er rørsluár vilja vit í Nólsoy eisini taka táttin upp og skipa fyri kapprenning á ovastevnu fyri vaksin og børn, sigur Karlot Hergeirsson**

OVASTEVNA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Menn og kvinnur fara at renna úr bygdini, av Træbrúgv (við fótboltsvøllin) og niðan á Oyggjarmúla.

At klára at renna niðan á Oyggjarmúla í einum hevur tey seinastu nógvu árini haft ein serligan status fyri nólsoyingar.

Renningin tók seg upp seinast í 70-árunum, tá nólsoyingar aftur fóru at rógva kapp. Renningin niðan á Oyggjarmúla var hildin – og rætt er tað nokk – at vera beinleiðis orsøkin til tey góðu úrslitinum hjá 10-mannafarinum í 80-unum og fyrrapartin av 90-unum. Tað var leingi ein »hemmiligheit« millum nólsoyingar, hvørjar duldar kreftir oyggjarmúlarenningin gav.

Kláraði tú at renna niðan í einum og undir 10 minuttir, var tú roknaður fyri at verða í góðari venjing og egnaður til at rógva við Nólsoyinginum. Onkur sigur seg hava klárað tað undir 9 minuttir, men teir er ikki so nógvir.

Tað hevði verið stuttligt og forvitnisligt at sæð rennanar úr øllum Føroyum, elitu- eins og motiónsrennarar, at royna kreftir við Múlan, so vónandi vera tað fleiri, sum melda seg til.

Teinurin av Træbrúgv og niðan á Oyggjarmúla er 1550 metrar. Teir fyrstu 700 metrarnir eru eftir asfalti og grúsi, restin er hagalendi við veitum og øðrum góðum forðingum. Lendið hækkar alla tíðina, og teir seinastu 100 metrarnir er ein eitt sindur brættari brekka niðan á sjálvan Múlan. Startmálið á Træbrúnni er í tveir metra hædd, og málið á Oyggjarmúla er í 120 metra hædd. Men tað er ongantíð høgt og eingin vandi fyri at detta útav, so øll kunna vera við.

Renningin fyri børn verður nakað styttri, umleið 500 metrar. Av Træbrúgv út og runt flakavirkið, og heim aftur á Træbrúgv.

Tann endaliga skráðin fyri ovastevnu er ikki løgd enn, men meinigin er at hava renningina leygardagin klokkan 15 fyri børn klokkan 17 fyri vaksin. Sí annars skránna tá hon er lýst.

Tilmelding á karlot@kallnet.fo ella á staðnum ein tíma áðrenn renning. Kosnaðurin fyri vaksin er 50 krónur og fyri børn 20 krónur, sigur Karlot Hergeirsson, sum er fyrireikari av renningini.



*Hetta er teinurin, ið verður runnin á ovastevnu, av Træbrúnni niðan á Oyggjarmúla*